# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Change we need

Okkum tørvar broyting er yvirskriftin í valstríðnum hjá Barack Obama, og ongantíð í søgu USA hevur eitt herróp hóskað so væl til eina politiska støðu. Olof Palme verður mangan mintur fyri orðini: *politikkur er at vilja*. Eftirtíðin hevur lyndi til at gloyma, at tað, sum Palme í veruleikanum segði var, at politikkur er at vilja **broyting**. Palme visti og skilti, at eitt samfelag í roynd og veru hevur tveir valkostir: at standa í stað ella mennast og broytingin er týdningarmesta fortreyt fyri menning. Tann karismatiski Obama minnir ikki sørt um Palme – politiskt sovæl sum persónliga.

USA er undir Bush fyrisitingini steðgað upp. Her eru ongar broytingar hendar, eingin menning og hvørki nútímansgerð ella nýskapan. Harðrendi neokonservativu politikkurin og tann sterki nýliberali búskapar- og fíggjarpolitikkurin hava havt køvandi ávirkan á alt amerikanska samfelagið. Úrslitið er búskaparlig stagnatión, ovurstórt hall á samveldisfíggjarlógini, metstór almenn skuld, arbeiðsloysi og húsagangur. Bankakreppan kom ikki av ongum, men av, at alt bankaeftirlit varð strikað, tí eftirlit sampakkar ikki við neoliberalismuna. Metstóra arbeiðsloysið stavar m.a. frá, at amerikanska stjórnin als ikki hevur skilt globaliseringina og tí onga strategi hevur havt til tess at takla hana. Obama hevur eina greiða strategi og tað er m.a. hetta, sum onkur t.d. formaður Fólkafloksins hevur tulkað sum isolationisma. Orkutrotið hevur verið ein tann størsti trupulleikin seinastu átta árini. Í staðin fyri at finna alternativar orkukeldur og reka ein orkusparandi politikk hava Bush og fylgisneytar við hermegi roynt at vinna ræðið á oljuni í Miðeystri. Í staðin fyri at fara at rótini til yvirgang hevur USA síðan nine eleven ført eitt kríggj móti yvirgangi, sum bert hevur økt um yvirgangin og elvt til, at USA hevur mist allar vinir í triðja heiminum. Hesin politikkur hevur elvt til sorgarleikir, ótrygd og ófrið ikki bert í Miðeystri – hesin politikkur hevur gjørt, at USA hevur mist leiðsluna í heiminum. Kina og India gera seg til reiðar at taka um róðrið.

Tað er tí so satt sum tað er sagt, at USA tørvar broyting á øllum økjum. Obama hevur málini, hann hevur strategiirnar og framum alt hevur hann viljan til broyting. Uttan ein sterkan broytingarsinnaðan forseta kemur USA ikki aftur á føtur. Politikkur Obamas kann fyri amerikanarum tykjast at merkja ógvusligar broytingar, tí teir hugsa so nógv øðrvísi enn t.d. europearar. Í roynd og veru er bert talan um at byggja upp eitt vælferðarsamfelag, sum vit kenna tað í vestureuropa - um at nútímansgera útbúgvingarverkið og arbeiðsmarknaðin, so hesi matsja altjóðagerðina, um at reka ein orkupolitikk, sum kann tryggja, at USA ikki næstu mongu árini gerst enn meira búskaparliga og politiskt heft at diktaturstatum í Miðeystri og í latínamerika. Sagt við øðrum orðum merkir Obama ein tryggari heim, meðan McCain merkir, at sama politiska vandakósin verður hildin, til vanlukkan rakar USA og allan heimin sum ein triði heimsbardagi ella ein altoyðandi orkukreppa. Tað eru tí allar orsakir til at ynskja Barack Obama og harvið okkum øllum eitt gott val í dag eins og orsøkir eru til at fegnast um, at Jóannes, Kaj Leo og Høgni eru heilhugaðir Obamamenn. Hetta síðsta er okkum øllum til heiðurs.

**Sosialurin**

## Hin órøkti Knørrur



**PETUR Í GONG**
valevni tjóðveldis til Tórshavnar kommunu

Eitt fagurt summarkvøld á Skálatrøð. Bátar verða flotaðir og drignir. Prátið gongur dúgliga. Virkin og spelkin ungómur við høgum málum og góðum vónum leggur sær lunnar undir eitt megnar avrik fyri árið. Livandi fornmentan mitt í okkara modernaða dagligdegi.

Við einum ótali av fremmandum ferðafólki, ið av tilvild detta inn á gólvið, er hetta ein frálíkur sýnisgluggi fyri eina tjóð, ið so hegnisliga megnar at varðveita síni eyðkenni. Ein tjóð, íð livir av havinum, og har báturin hevur alt at siga.

Rógvarar og bátar í hópatali leggjast afturat í gamla høvuðstaðarfelagnum á Skálatrøð, Róðrarfelagnum Knørri. Við miðvísa ungdómsarbeiðinum rúmar felagið nú rógvarum heilt niður í 11ára aldur við øllum teimum avvarðandi, ið hartil hoyra. Men neystið veksur ikki. Ves og skiftingarrúm er á hædd við umstøðurnar í slumminum í Adis Abbaba. Bátarnir mugu víkja fyri øðrum bátum og oljutunnum í kommunala bygninginum, har teir annars nýliga høvdu vunnið sær innivist fyri veturin.

Einki er broytt hesi skjótt 25 árini, annað enn, at býráðið brúkti 1,5 mió uppá at burturbeina fornminnið Lágukai, so tað nú næstan ikki er gangandi uttanfyri neystið uttan at bekla.

Men okkurt forbarmilsi fær felagið kortini úr grannalagnum. Við nakað av náði Lutzensmanna og gomlum byngjum klárar felagið so dánt at húsa virkseminum, hóast umstøðurnar mugu sigast at vera ótolandi. Alt meðan tað almenna vendir okkum bakið, og ikki hirðir okkum nakað svar. Hvat halda tit Knørrafólk um tað?

Er tað ílagið, at eitt so virki felag sum Róðrarfelagið Knørrur, ið hevur so nógvan ungdóm um hendi, fullkomiliga verður ignorera? At eitt felag, sum hevur so nógv at geva býnum, á ongan hátt verður virt sum tann samfelagsligi hornasteinur, tað er? Er tað ílagi, at hesin munur skal gerast á feløgum? Tí hetta er ikki nakað eindømi.

Hevði felagið fingið pengaligan stuðul, hevði tað púra víst fløvað væl. Men tað er ikki tað, ið er mest átrokandi. Tørvurin er fyrst og fremst eitt JA! fram um undanførðslur og undanstøkking. Høvdu vit bara fingið loyvi til eitt ella annað frá Tórshavnar Kommunu, høvdu vit saktans kunna fylt karmarnar sjálvi.

So gevið hesum gamla róðrarfelag, ið hevur verið lívsæðrin hjá so mongum Havnarmanni og øðrum við, møguleikan framhaldandi at vera vertur fyri øllum teimum hundraðtals ferðafólkunum, sum alt summari á tamb av nátúrligum forvitni vitja okkum í neystinum, har tey frá fryntligum ungum rógvarum fáa innlit í henda virkna partin av okkara mentan. Gevið okkum møguleika fyri at gera okkara fyri at varveita livandi partin av býnum, meðan so nógv annað í miðbýnum doyr.

www.tjodveldi.fo/petur

## Ítrótturin og trivnaðurin



**VAGNUR JOHANNESEN**

Ítrótturin er eitt av mínum hjartamálum. Farnu árini havi eg, saman við mongum í Kollafirði, lagt alla orku í byggingina av ítróttarhøllini í Kollafirði. Úrslitið er sjónligt – við samanhaldi og ágrýtni – hava vit bygt stórstu og snotisligastu ítróttarhøllina í landinum.

Enn er ikki komið endiliga á mál. Hallarstuðlar hava søkt kommununa um játtan til projektering av ovaru hæddunum, sum eru ætlaðar til felagshølir og uppihaldsrúm hjá ítróttini. Hetta eru íløgur, sum hava stóaran týdning fyri samlaða projektið, og sum eg ætli at fremja, fái eg møguleika til tað.

Somuleiðis er við ítróttarhøllini á Argjum, sum argjafólkum er lovað. Tí projektinum eri eg sera positivur yvir fyri.

Tórshavn tørvar eisini eina høll, sum verður meginhøllin í kommununi. Tí eigur høllin á Nabb at verða umbygd, so vit sømuliga kunnu bjóða okkum fram í altjóða kappingum.

Ítrótturin hevur ómetaliga stóran týdning fyri trivnaðin í nútíðarsamfelagnum.Tí skal býráðið gera greiða íløguraðfesting fyri hetta so átrokandi økið, hondbóltinum, fimleikinum, fótbóltinum – ja, øllum ítróttinum at frama.

Alt hettar krevur pening. Tí er neyðugt at raðfesta við skili. Her skal mín lutur ikki liggja eftir.

Vel ávirkan, vel Vagnur

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.